TING-HELLAN

# Løgmaður, Ingeborg og

Ingeborg Winther noktar at blása av stættastríðið, tí enn hevur arbeiðarastættin nógv av stríðast fyri. Jóannes Eidesgaard sigur, at stríðið er av, tí arbeiðarin hevur vunnið tey grundleggjandi rættindini. Bæði Ingeborg og Jóannes eru týdningamiklir aktørar í tí politiska spælinum, og tey bæði nýta hugtakið »stætt« í einari roynd at legitimera og halda fast um sína maktstøðu í einari broytingartíð við nýggjum avbjóðingum, sum krevja breitt samstarv heldur enn orðadrátt



*Fróði Jacobsen*



*Jóhann Lützen*



**STÆTTASTRÍÐ**

*Fróði Jacobsen og Jóhann Lützen skriva serritgerð í sosialvísund og samskifti á Roskilde Universitetscenter*

Søguliga týdningin av skipaðu arbeiðararørsluni – fakfeløgunum og politisku sosialistisku flokkunum – í stættastríðnum og menningini av vælferðarsamfelagnum munnu tað helst vera fá, sum ivast í. Fyri tað kann tað tykjast løgi fyri okkum, sum eru ung í dag, at stætta- ella klassastríð framvegis kann vera grundleggjandi hugtak í almenna kjakinum, tá tað snýr seg um politisk mál og mið, nú liðið er væl um annað túsundáraskiftið.

Á aðalfundinum hjá Føroya Arbeiðarafelag í mars 2006 ákærdi Ingeborg Vinther løgmann fyri ikki at hava innlit í viðurskiftini hjá vanliga arbeiðaranum, tá ið hann á landsfundinum hjá Javnaðarflokkinum á heysti 2005 segði, at stættastríðið er av, tí arbeiðarafjøldin hevur vunnið tey grundleggjandi rættindi, sum hon hevur stríðst fyri.

Tey fýra stóru arbeiðarafeløgini funnust í felag at løgmanni fyri hesa áskoðan í lesarabrævi tann 7. desember 2005 og vístu samstundis á, at korini hjá vanliga arbeiðaranum enn als ikki vóru nøktandi. Vanligi arbeiðarin er eftirbátur, tá talan er um løn undir sjúku og tá talan er um sosialar veitingar annars, ljóðar atfinningin.

Javnaðarflokkurin má hyggja frameftir og koma víðari í sínum politikki, sigur Jóannes Eidesgaard, og heitir á arbeiðarafeløgini um at gevast við at »halda lív í einum fiktivum stríðið, sum er liðugt«. Henda áheitan frá formanninum í flokkinum, sum traditionelt hevur umboðað verkafjøldina, sýnist at hava skelkað arbeiðarafeløgini.

Fyri Ingeborg er er stættastríðið als ikki av. Stórur stættamunur er, eftir hennara tykki, í føroyska samfelagnum; og vanligi arbeiðarin er við sviðusoð.

Hvussu kunnu formaðurin í gamla arbeiðaraflokkinum og forkvinnan í størsta fakfelagnum í landinum vera so grundleggjandi ósamd? Tað er hesin spurningur, sum fekk okkum at tríva í pennin og geva okkara hugsan til kennar.

### Stætt

Ósemjan millum tey bæði, Jóannes og Ingeborg, hevur eftir okkara tykki sína grund í einum sera avmarkaðum stættastríðshugtaki. Fyri Jóannes er stættastríðið av, tí arbeiðarastættin hevur vunnið tey grundleggjandi rættindini, meðan arbeiðarastættin, eftir áskoðan Ingeborgs, enn hevur nógv at stríðast fyri. Semja tykist vera teirra millum um, hvør arbeiðarastættin er, nevnliga limirnir í arbeiðarafeløgunum. Arbeiðarastættin verður soleiðis reduserað til limir í arbeiðarafeløgum.

Innan sosiologi'ina er tað eitt framhaldandi kjakevni, um stættir yvirhøvur finnast, og um stættahugtakið yvirhøvur kann brúkast til fatanina av dagsins samfelag. Nýggjari sosiologisk ástøði vísa á, at tað sum eyðkennir umskiftið frá modernaða samfelagnum til sein-modernaða samfelagið er individualiseringin. Individið, einstaklingurin, gerst minni og minni bundin av stætt, familju, kyni o. t. Økta vælferðin, vunnin rættindi, betri livikor og atgongd til útbúgvingar hava við sær størri møguleika hjá tí einstaka at skapa sítt egna lív. Individualiseringin merkir tó ikki økt individuelt frælsi rætt og slætt, men hevur økta »institutionella« binding sum fylgisvein. Binding av peningi, forbrúki, sosialari trygd, osfr.

Ein avgerandi avleiðing av individualiseringini er, at gomlu stættastrukturarnir frá ídnaðarsamfelagnum fara í upployson. Týski sosiologurin Ulrick Beck tosar um, at vesturlendsku samfeløgini eru ella hava verið í eini broytingartíð, har einstaklingurin so líðandi sleppur undan teim sosialu bindingunum at stætt, familju og kyni, sum hoyrdu ídnaðarsamfelagnum til og í staðin sjálvur má/kann leggja sítt lív tilrættis og velja sín egna samleika gjøgnum val av karrieru, lívsstíli og forbrúki. Samstundis kann hin einstaki á lívsleiðini stilla ella broyta sína lívskós. Seinmodernaða samfelagið gerst soleiðis stigvíst til eitt avtraditionaliserað og individualiserað post-stættasamfelag.

### Brotakenda stættastríðið

Samfelagsbroytingarnar merkja tó ikki, at sosiali ójavnin hvørvur. Ójavnin broytir harafturímóti skap og missir líðandi sítt stættaaeyðkenni. Ein annar navnframur sosiologur, Anthony Giddens, vísur á somu gongd. Hann heldur uppá, at siðbundni felagskapurin í arbeiðarastættini er niðurbrotin. Stættir eru til enn, men vera ikki longur bara defineraðir í mun til ogn av framleiðslutólunum. Tí er stætt ikki longur ein kollektiv lagna. »Stætta«-munir upplivast meiri í mun til lívsleið hins einstaka enn í mun til stættauppruna.

»Stættastríðið« í vesturheiminum í dag snýr seg um treytir og møguleikar hjá einstaklinginum fyri luttøku í samfelagsins sosialu skipanum. Tað er eitt stríð um inklusión – at hoyra til, vera við – í samfelagnum. Treytirnar fyri somu inklusión verða alt meiri individualiseraðar, og í flestu londum hevur niður- ella avreguleringin av marknaðinum havt stórar ójavnar við sær. Ójavnar millum tey, sum hava eftirspurdu ressursurnar við sær, og tey, ið ikki hava tær. Og júst henda sosiala sundurskiljingin og menniskjans ymisku tørvir og møguleikar fyri inklusión spjaðir og splintrar felags málið, sum var tað upprunaliga í stættastríðnum. Stutt sagt so eru fólk í seinmodernaða samfelagnum so ymisk, hava so ymiskt at takast við og vera upptikin av, at tað er ógjørligt hjá arbeiðararørsluni at savna ein felags front við einum felags endamálið.

Fyri at venda aftur til kjakið millum Jóannes og Ingeborg, so hevur stríðið hjá arbeiðararørsluni søguliga sæð verið eitt stríð um tað sosiala samborgaraskapið – eitt stríð fyri borgaralig, politisk og sosial rættindi og størri búskaparligan javna og harvið møguleikanum hjá arbeiðarunum at luttaka á øllum økjum í samfelagslívinum. Hetta var endamálið hjá arbeiðararørsluni. Í góðum tíðum við búskaparligari framgongd og lítlum arbeiðsloysi gerst meiri sjónligt, hvussu torført tað er at hjá arbeiðararørsluni at eyðmerkja felags áhugamál fyri eina sindraðari fjøld av menniskjum við heilt ymiskum áhugamálum, lívsstíli, politiskum identiteti o.s.fr. Serliga tá kann tað tykist at kalla komiskt av Ingeborg Winther at tvíhalda um »stættastríðið« sum felagsnevnara í stríðnum um størri part av samfelagsins úrtøku. Tí tey grundleggjandi rættindini eru vunnin, tað hevur Jóannes Eidesgaard púra rætt í, og figgjarligu reguleringarnar, sum forkvinnan í Føroya Arbeiðarafelag eftirlýsir, hoyra heima á samráðingarborðinum við Føroya Arbeiðsgevarafelag, ikki sum eitt neyðarróp fyri stættina í fjølmiðlunum.

Góðar grundir eru tó hjá Ingeborg Winther at varðveita stættastríðið sum hugtak og snúningsdepil í almenna kjakinum. Sum fakfelagsleiðari umboðar Ingeborg nógvar limir, sum kenna seg aftur í stættini. Við at fasthalda fatanina av einum umfatandi stríði millum stættir, fáa krøvini um batar størri tyngd. Tað skal røra hjartastreingir hjá arbeiðarafjøldini. Søguliga sæð hevur arbeiðarastættin verið bókstaviliga sæð »pínd og týnd«. Ingeborg heldur lív í hesi ímyndini av útasaða og tránýtta verksmiðjuarbeiðaranum frá ídnaðarsamfelagnum, tá hon brúkar hugtakið stættaella klassastríð. Samstundis legitimerar Ingeborg sína makt (og starv) sum fakfelagsleiðari við at røkta barnatrúnna um solidaritetskensluna í stættini. Samráðingar- og undirtøkutaktikst er tað nokk útmerkað.

Men kann tað hugsast, at henda ímyndin um kúgaðu stættini eisini kenst stigmatiserandi og niðrandi fyri stóran part av limunum í fakfelagnum hjá Ingeborg? Kenna limirnir í stættini hjá Ingeborg, sum eru rímiliga væl fyri, bæði materielt og mentanarliga breitt sæð, seg aftur í einum stættasamleika, sum byggir á mótsetningin ímillum »okkum og hini«, sum ein mótsetning millum arbeiðsfólk hjá tí privata og hjá tí almenna (ofta